# Raúl verri enn Fidel

Mannarættindini í Kuba eru viknað, síðani Raúl Castro tók við sum forseti eftir bróðurin Fidel. Eitt nú er talifrælsið skert síðani leiðaraskiftið. Tað stendur at lesa í teirri árligu frágreiðingini hjá amerikanska uttanríkisráðnum um mannarættindi. Sagt verður, at politisk mótstøðufólk verða forfylgd verri enn fyrr, og at løgreglan fer munandi harðari fram ímóti fólki, sum vísa sína misnøgd. Harafturat stendur, at viðurskiftini í teimum kubansku fongslunum eru stak vánalig.



# Væntar semju við Taleban

Guvernørurin í tí ófriðarliga afghanska landspartinum Helmand heldur, at tað ber til at fáa semju við teir flestu av teimum Taleban-stríðsmonnunum, sum eru í økinum. Gulab Mangal, guvernørur, sigur við BBC, at Taleban-stríðsmenninir í Helmand kunnu býtast í tríggjar bólkar, og hann heldur, at tað ber til at fáas semju og frið við tveir av bólkunum. Tann triði bólkurin samstarvar við al-Qaeda, og tað ber ikki til at tingast við hann, sigur guvernørurin. Teir donsku hermenninir í Afghanistan hava støð í Helmand-landspartinum, sum er tann ófriðarligasti í øllum Afghanistan.

## Ráur harðskapur meira vanligur

Kommunulæknin á Sandi, Dánjal Petur Højgaard, heldur at harðskapur av meira ráðum karakteri er blivin meira vanligur í Sandoynni nú enn fyrr.

- Tað eru nøkur mál av og á av harðligum karakteri. Eg haldi næstan at harðskapurin er blivin meira harðligur nú enn fyrr. Fyrr haldi eg at menn meira bardust, og ikki sum nú við nevum og øðrum amboðum og tílíkt. Tað er blivið meira brutalt nú, sigur Dánjal Petur Højgaard.

Tað er tó ikki gerandiskostur, at hann verður forstýraður í vikuskiftunum av slíkum málum.

- Eg verði vanliga ikki forstýraður um næturnar, og í vikuskiftunum. Men tað hendir seg, at eg verði uppringdur í vikuskiftunum. Men tað, at vit verða noyddir at biðja Teistan sigla eykatúr mitt á náttini, tað man vera sera sjáldan, greiðir Dánjal Petur Højgaard frá.

- RN

# Smildraði mann við ja



*Maðurin var meir ella minni smildraður sundur við eini jarnstong. Hann fekk hol á lungað av løstunum, og vildi illa til, varð hann deyður. Tíbetur var læknin um hann um náttina, og sá vandatekini. Hann fekk mannin fluttan á Landssjúkrahúsið, og tað bjargaði honum lívið*

*Modelmynd: Jens Kristian Vang*

**Eitt keglarí millum tveir skopuningar náttina til leygardagin mundi endað við drápi. Annar maðurin varð meir ella minni smildraður sundur við eini jarnstong. Og tað stóð um lív hjá manninum. Teistin mátti loysa á miðjari nátt, og tað bjargaði manninum**

112
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

Rættiligur dramatikkur hevur verið í Skopun farna vikuskifti..

Tað byrjar fríggjakvøldið, tá nakrir mans sótu og ballaðust í einum húsum í Skopun. Um midnátt fara tveir av teimum upp at keglast, og tann eini biður hin koma út um.

Hvat mennirnir, ið báðir eru mitt í tjúgunum, eru farnir at keglast um, er ógreitt, men tá teir eru komnir út um, fara teir til henduts.

Tá avtornar, liggur annar av teimum eftirá, bukaður sundur og saman við eini jarnstong. Sýslumaðurin í Sandoynni, Høgni í Dali, verður uppringdur, men hann biður mannin venda sær til kommunulæknan fyri at fáa viðgerð, og tá tað er yvirstaðið, um at venda sær aftur til sýslumannin. Men maðurin vendi sær ongantíð aftur til sýslumannin. Hann mátti nevnliga við skundi flytast á Landssjúkrahúsið, tí lívið hjá honum stóð í váða.

### Stóð um lív

Kommunulæknin á Sandi, Dánjal Petur Højgaard, kom til Skopunar um náttina at kanna skaðarnar hjá manninum.

- Hann var komin í eina farliga støðu. At byrja við hildu vit, at hann var sloppin við nøkrum brákaðum rivum, men sum longur leið út á náttina, gjørdist hann verri og verri fyri. Hann hevur fingið eitt slag inn í síðuna móti rivjabeinunum, sigur Dánjal Petur Højgaard.

Tá klokkan leið út móti hálvgum trý, var maðurin so illa fyri, at boð vóru send eftir sjúkrabili, at fáa flutt mannin á Landssjúkrahúsið.

Strandfaraskip Landsins váttar, at skiparin á Teistanum umleið klokkan 02.30 fekk boð um at teir skuldu halda seg klárar, tí sjúkrabilurin hevði flutning, og at klokkan 02.40 loysti Teistin av Skopun við bráðfeingisflutninginum.

- Tað var fyri neyðini at vit fingu mannin fluttan á Landssjúkrahúsið. Tað vísti seg at rivjabein vóru brotin, og hol var komið á annað lungað. Hetta kann vera